# innan má finna egnar leiðir

og tað vísti eisini á, at nýggjar vinnur tora at bjóða seg fram og gera vart við seg – eisini millum tungvektarar uttanlands. Aðrar føroyskar fyritøkur framleiða eisini klæði, sum verða seld av landinum, og ullin, sum einaferð var Føroya gull, er aftur komin inn í hitan.

Men hóast tað eru spennandi møguleikar í eini føroyskari klædnavinnu, ber tað ikki til at leggja eina yvirskipaða ætlan fyri hesa vinnu.

– Móti er ein kreativ vinna, og tí ber ikki til at kopiera ein, sum hevur klárað seg væl. Tað er ræður um at vera originalur og ikki kopiera, og tí kann tað almenna ikki leggja eina neyva ætlan fyri tær kreativu vinnurnar, sigur Guðrun Rógvadóttir, sum er onnur av kvinnunum aftanfyri Guðrun & Guðrun.

- Tað hevði verið tað sama sum at sagt, at nú hava vit ein Teitur, sum klárar seg væl, og tí skulu vit kopiera hann og fáa fimm Teitur afturat. Tað ber ikki til. Fyri tað um ein klárar tað, so ber ikki til at siga, at til dømis klædnamóti verður ein stór vinna í Føroyum, heldur hon.

Guðrun Rógvadóttir heldur, at tað almenna skal ikki spæla ov stóran leiklut, tá ið tað snýr seg um nýggjar vinnur.

– Tað almenna skal ikki siga, hvussu vinnan skal rekast, men heldur trúgva upp á, at tey sum eiga og reka fyritøkurnar, vita, hvat er best fyri teirra fyritøku. Tað almenna kundi heldur latið stuðul til serlig átøk ella tiltøk. Vit høvdu herfyri eina stóra mótasýning á flogvøllinum, men vit fingu ikki eitt oyra í almennum stuðli til tiltakið, tí tað var eftir øllum at døma ov originalt til at fáa stuðul, sigur hon.

**FAKTA**

Danski klædnaídnaðurin útflutti í 2006 vørur fyri 25,7 milliardir krónur. Hetta var ein vøkstur á 2 milliardir krónur samanborið við 2005

Størstu útflytararnir eru main-stream vørumerki sum Brandtex, IC Companys, BTX Group og Bestseller, sum millum annað hevur Vero Moda. Eisini danskir designarar sum Munthe Plus Simonsen og Noir hava stóran týnding fyri útflutningin av klædnavørum.

Í Danmark vórðu í 2007 nýttar 35 milliardir krónur uppá klæði og 5,5 milliardir uppá skógvar.

Til mótamessuna, sum var í Keypmannahavn herfyri, vóru umleið 60.000 innkeyparar og fjølmiðlafólk úr øðrum londum.

## Stuðul á rættan hátt

Nýggja landsstýriskvinnan við vinnumálum ætlar sær at virka fyri, at nýggjar vinnur kunnu koma fyri seg í Føroyum, og hon er farin í holt við at kanna, hvussu nýggjar vinnur kunnu stuðlast á rættan hátt.

– Vit vilja gjarna spæla ein virknan leiklut og stuðla upp undir á rættan hátt. Vit hava sett okkum fyri at kanna, hvussu hetta kann gerast, og vit eru farin í holt við hetta arbeiðið. Vit skulu finna fram til, hvat nú manglar fyri at fólk vilja fara í gongd við nýggjar vinnur, sigur Bjørt Samuelsen.

Hon heldur, at tað eru møguleikar í mótavinnuni og øðrum kreativum vinnum.

– Ísland og Finnland hava til dømis klárað at branda seg við sniðgeving. Vit hava sera dugnaligar sniðgevarar í Føroyum, og tað ber væl til at hugsa sær, at sniðgeving verður ein partur av føroysku tjóðarbrandingini, sigur Bjørt Samuelsen.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin við vinnumálum heldur, at nógv er broytt í føroyskum vinnulívi seinnu árini.

– Tað er hend ein broyting í føroyskari vinnu, men vit hava ikki enn fingið hetta staðfest í hagtølunum, og tað er stórt spell. Okkara veika síða hesi árini hevur verið, at vit ikki hava kunnað eftirmett okkara vinnupolitikk, tí góð og neyv hagtøl eru avgerandi fyri hetta arbeiði, sigur Bjarni Djurholm.

– Fiskivinnan er framvegis høvuðsvinnan í Føroyum, men vit hava fingið fleiri aðrar vinnur, sum hava fingið størri týdning fyri føroyska samfelagið. Tað grør um gangandi fót. Politikkurin saman við vinnuligari nýhugsan og váðafýsni hava givið úrslit, og nú er avbjóðingin er at halda fast í vøkstrinum.

Bjarni Djurholm heldur, at tað almenna skal skapar karmarnar fyri vinnulívið, men ikki blanda seg upp í, hvussu fyritøkur og vinnur verða riknar.

– Tað almenna skal ikki verða vinnurekandi, men skal gera so smidligar og lættar skipanir sum gjørligt, so at fólk, sum vilja í holt við nakað, ikki renna frá Per til Pól. Vinnumálaráðið hevur seinastu árini lagt stóran dent á at dagføra alt lógargrundarlagið, og frá nýggjárinum er føroysk vinnulóggáva ajøvn við altjóða lóggávu, sigur hann.

## Fiskurin svimur undan

Føroysku útflutningstølini siga sína greiðu søgu um, hvat tað er, sum gevur føroyska samfelagnum flest inntøkur úr útheiminum.

Fiskur og fiskavørur standa framvegis fyri 96 prosentum av vøruútflutninginum, og verða tænastur tiknar við, er talið framvegis høgt. Seinastu tølini fyri gjaldsjavnan eru frá 2004, og tey tølini vísa, at fiskur stendur fyri umleið 85 prosentum av inntøkunum frá vøru- og tænastuútflutningi.

Tølini hjá Hagstovu Føroya vísa, at ein ávís broyting hevur verið í útflutningstølunum seinastu tvey árini, tí aðrar vørur enn fiskur eiga ein størri part av útflutninginum, men hesi tøl skulu takast við fyrivarni. Áðrenn 2006 høvdu fyritøkur bert skyldu til at boða frá útflutningi av fiski, men nú er lógarkravt, at allur útflutningur skal skrásetast. Tað hevur havt við sær, at bólkurin "Aðrar vørur" er vaksin.

– Tølini siga púra greitt, at føroyskur útflutningur nú sum áður snýr seg í høvuðsheitum um útflutning av fiski og fiskavørum. Tað er trupult at fáa eyga á nakran munandi vøkstur í útflutninginum av vørum, sum ikki hava við fisk at gera, og enn hava vit ikki kunnað staðfest nakran týðandi vøkstur í útflutninginum av tænastum, sigur Herman Oskarsson, stjóri á Hagstovu Føroya.

Hagstovan er í løtuni í holt við at gera gjaldsjavnan fyri 2005 og 2006 upp, og tá ber til at staðfesta, hvussu gongdini hevur verið hesi árini, men stjórin á Hagstovuni roknar ikki við nøkrum munandi broytingum í býtinum millum fiskin og hinar vinnurnar.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin við vinnumálum, Bjarni Djurholm, heldur, at framgongdin hjá teimum, sum útflyta vørur ella tænastur, ið ikki hava við fisk at gera, er størri, enn tølini vísa.

– Tað er nógv hent seinnu árini, og eg eri als ikki í iva um, at vinnur sum KT, ferðavinna, bankavirksemi, kreativar vinnur og aðrar vinnur spæla ein vaksandi leiklut í føroyska útflutninginum. Í løtuni hava bara eingi tøl, sum kunnu prógva hetta, sigur Bjarni Djurholm.

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Føroyskur útflutningur

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fiskur og fiskavørur | 3.764.616 | 3.476.691 | 3.366.795 | 3.641.835 | 3.775.136 |
| Aðrar vørur | 8.660 | 23.379 | 23.709 | 150.942 | 136.190 |

Tølini eru í 1.000 kr.

### Munurin minkar

Samanlíkning millum føroyska útflutningin av fiskavørum og aðrar vørur vísir, at aðrar vørur standa fyri vaksandi parti av útflutninginum. Tølini skulu tó takast við fyrivarni, ti ein partur av vøkstrinum stavar frá eini lógartekniskari broyting í 2006.

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Aðrar vørur /fiskavørur | 0,2 % | 0,7 % | 0,7 % | 4,1 % | 3,6 % |